# Innihald


4 Fylgisveinamátingar geva nýtt innlit í gróðurin kring Føroyar

8 Toskur, hýsa og upsi eta ymiskt

10 *Kudoa* í makreli

12 Vísindavøkan 2015

14 Kalda holið, „Golfstreymurin" og okkara veðurlag

18 Økt makrelgýting í føroyskum havøki

21 Nýggj fiskasløg skrásett við Føroyar

22 Tíðarseriur

24 Sólarmyrkingin ávirkaði fuglin í Skúgvoy

26 Samanbering av lívfrøði hjá longu og brosmu

28 Lutakast millum innsend fiskamerkir

30 Tilmæli

39 Støðan hjá toski, hýsu og upsa

40 Verkætlanir á Havstovuni í 2016

45 Gransking í útnorði

46 Rakstur 2015

46 Ritgerðir 2015

48 Fyrilestrar 2015

50 Postarar 2015



Sjóvarmál 2016

Lagt til rættis: Havstovan | Ritstjórn: Lise H. Ofstad, Hanna Elina Djurhuus og Dagunn H. Jógvansdóttir Clementsen | Satsur og uppseting: Havstovan | Prent: Føroyaprent | Útgáva: Havstovan 2016 | Tað er gaman í at nýta tilfar úr ritinum, um bert keldan verður upplýst | ISBN 978-99918-831-6-8

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705




Oddagrein

# Vitan til vinnu og

Havstovan er til fyri at fáa til vega ítøkiliga vitan um okkara havumhvørvi og tað livandi havtilfeingið, sum har er. Úrslitini frá granskingini skal Havstovan fáa út til vinnuna, myndugleikarnar og almenningin. Sjóvarmál er ein partur av hesari kunning.

Ítøkilig vitan um tað føroyska havtilfeingið og náttúruviðurskiftini er alneyðug fyri støðugt at menna fiskivinnuna á sunnum lívfrøðiligum og vinnuligum grundarlagi, umframt at hon er neyðug hjá myndugleikunum, bæði í stýring av fiskivinnuni og í samstarvi og samráðingum við onnur lond um felags tilfeingi.

Nýggj vitan kemur bæði frá vinnuni sjálvari og frá gransking. Fiskiskapur gevur ávísar upplýsingar og granskingin gevur aðrar. Í dagliga arbeiðinum á Havstovuni er tilfar frá fiskiskipum ein virðismikil partur, men ynskiligt er, at samstarvið millum gransking og vinnu kann gerast meira aktivt í framtíðini. Her verður bæði hugsað um royndir og samskifti.

Arbeiðið, at fáa nýggja vitan til vega, er endaleyst. Nýggj vitan kemur støðugt undan kavi og legst afturat teirri vitan, ið er frammanundan. Men skal vitanin koma til nyttu, er umráðandi, at hon verður kunnað út í samfelagið, og at eitt livandi samskifti er millum teir ymisku aktørarnar.

Í hesum riti eru stuttar greinir, ið á ein lætt fatiligan hátt greiða frá einum útvaldum parti av teirri gransking, sum Havstovan fæst við.

Teir stóru havstreymarnir í Norðuratlantshavi hava alstóran týdning fyri

## samfelag



veðurlagið og fyri livilíkindini hjá okkara havtilfeingi. Klimabroytingar eru, ið gera framtíðarveðurlag óvist, men eingin ivi er um, at havstreymarnir og tann flutningur av hita, ið hesir streymar føra við sær, hava alstóran týdning fyri veðurlagið. Tí verður stórur dentur lagdur á at skilja havstreymarnar, sjóvarhitan og tær broytingarnar, ið har eru. Í hesum riti er ein grein um tey viðurskiftini.

Gróðurin er grundarlagið undir øllum øðrum lívi í sjónum, og Havstovan leggur tí stóran dent á at kanna gróðurin. Í hesum riti er greitt frá, hvussu fylgisveinar kunnu geva eitt yvirlit yvir nøgdirnar av plantuæti á Landgrunninum. Á henda hátt ber til at fáa yvirlit yvir, hvussu gróðurin mennist yvir stór øki.

Føroyar hava átikið sær ein aktivan leiklut í gransking av makreli og Havstovan luttekur í fleiri altjóða samstarvum. Hetta er neyðugt, skulu Føroyar vera við í samstarvinum um skipaðan fiskiskap eftir hesum tilfeingi. Sum liður í hesum granskingarsamstarvi luttekur Havstovan m.a. í kanning av gýting hjá makreli. Kannað verður, hvussu nógv rognkorn verða gýtt á ymiskum leiðum. Eitt av áhugaverdu úrslitunum er, at gýtingin í 2016 var munandi longri norðuri og vesturi enn árini frammanundan. Munandi størri partur av gýtingini var í føroyskum øki í ár enn árini frammanundan.

Makrelur er vorðin ein av okkara virðismestu útflutningsvørum. Viðhvørt verður fiskurin fongdur av einari veru, ið nevnist *Kudoa*. Fiskurin gerst tá bleytur og ónýtiligur til matna. Greitt er frá um granskingarsamstarv millum Havstovuna og makrelvinnuna um at loysa trupulleikan.

Síðani 1997 hevur Havstovan regluliga gjørt magakanningar av toski, hýsu og upsa. Kanningarnar eru gjørdar á øllum leiðum á Landgrunninum, á ymiskum støddum av fiski og ymiskar árstíðir. Í hesum riti verður givið eitt heildaryvirlit yvir magainnihaldið hjá hesum trimum fiskasløgunum í august, øll árini samanlagt. Meira enn 13.000 magar eru aftan fyri hesi úrslitini. Uttan iva sær lesarin, at til ber at greina magakanningar munandi meira í smálutir, m.a. broytingar í sløgum og nøgdum av føði millum ár, eftir stødd á fiskinum, leiðum o.s.fr. Tær greiningarnar hava vit til góðar til eina aðru ferð.

Longa og brosma eru fiskasløg, ið serliga eru týdningarmikil hjá línuflotanum. Upplýsingar um hesi bæði fiskasløgini eru at finna í hesum riti.

Til sólarmyrkingina í 2015 setti Havstovan sjálvvirkandi myndatól upp í Skúgvoy fyri at síggja, um sjófuglurin ávirkaðist av sólarmyrkingini. Í hesum riti finnur tú úrslitið.

Tíðarseriur av m.a. havfrøðiligum viðurskiftum, æti og tilgongd og støddum á fiskastovnum er ein fastur táttur í Sjóvarmáli. Her ber til at fáa sær hesar upplýsingar – umframt at samanbera teir ymisku parametrarnar.

Á hvørjum ári letur Havstovan myndugleikunum tilmæli um fiskiskapin eftir toski, hýsu og upsa. Veiðutrýstið skal stýrast við fiskidøgum, ið verða ásettir við lóg á Føroya Løgtingi. Ikki kann sigast, at henda mannagongdin virkar serliga væl. Langt er millum tað lívfrøðiliga tilmælið og tað lógarásetta talið av fiskidøgum. Samstundis má staðfestast, at meðan fiskiskapurin eftir uppsjóvarfiski og eftir botnfiski á fjarleiðum, og sum verður stýrdur sambært lívfrøðiligari ráðgeving, ber seg væl, so er støðan ein heilt onnur á nærleiðunum. Her verður fiskiskapurin stýrdur politiskt, heldur enn sambært lívfrøðiligu tilmælunum. Úrslitið kenna vit øll.

Ein stórur partur av virkseminum hjá Havstovuni er verkætlanir, ið verða fíggjaðar uttan fyri játtanina á fíggjarlógini. Summar av hesum eru føroyskar burturav, meðan aðrar verða gjørdar í samstarvi við útlendskar granskingarstovnar. Í hesum riti sæst eitt yvirlit yvir tær verkætlanir, ið Havstovan luttekur í. Eisini sæst eitt yvirlit yvir greinir og frágreiðingar, ið Havstovan gav út í farna ári.

Tann vitanin, ið Havstovan fær til vega, er almenn ogn, og vit hava sjálvsagt stóran áhuga í, at hon kemur út, bæði til vinnu, myndugleikar og almenningin, at hon verður brúkt, og at hon er vinnuni og samfelagnum at gagni. Tað er eisini okkara vón, at hetta rit er við til at kveikja áhuga fyri havinum og tí, sum har er, og fyri teirri vinnu, ið fær tilfeingið til høldar.

*Eilif Gaard, stjóri*